# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Samveldi í kreppu

Meirilutin av írsku veljarafjøldini feldi Lissabonsáttmálan og skúgvaði ES út í kreppu, sum eftir tí, sum mangir eygleiðarar meta, er ein tann mest álvarssama í ártíggjur. Tað, sum mangur spyr seg í dag, er, hvussu hevði ein fólkaatkvøða endað eitt nú í Fraklandi, Hollandi ella í Danmark? Hvat gekk galið, og hvussu kundu metingarnar gerast so skeivar? Írland hevur um ikki øll svar so nøkur svar til hesar spurningar, sum mong seta sær í hesum døgum. Hetta hevur alt nakað við sjálvan Lissabonsáttmálan at gera. Talan er um ein sera tekniskan og ómetaliga fløktan sáttmála, sum er sera torlisin. Í Írlandi, vilja fleiri blaðfólk og mótstøðufólk móti Lissabonsáttmálanum vera við, at sjálvt forsætisráðharrin dugdi ikki undir valstríðnum at greiða fólki frá, hvat hetta skjal í veruleikanum snýr seg um.

Tað er einki at ivast í, at vanlig fólk kring í ES londunum eru ivasom fyri ikki at siga beinleiðis neilig mótvegis ES. Myndin av einum ómetaligum skrivstovuveldi fjart frá heimlandinum stendur sterk. Kenslan at vera uttan fyri ávirkan og kenslan av, at stórar og týðandi avgerðir verða tiknar av anonymum embætismonnum fjart frá gerandisdegnum, er sterk. Somuleiðis er eitt vaksandi tilvit um eitt stórt og ikki sørt vandamikið demokratiskt hall í ovastu stovnunum í ES. Hartil kemur, at sera ymiskar politiskar mentanir bresta saman og uppfatanin av, hvat ið er demokratiskt og hvat ikki er demokratiskt, er sera ymisk. Alt hetta skuggar fyri teimum stóru og ítøkiligu fyrimunum, sum ES tryggjar sínum limalondum, teirra borgarum og vinnulívi.

ES limaskapur er fremjandi fyri búskaparligan vøkstur, mennandi fyri gransking og útbúgving, og ES er í roynd og veru vorðin heimsins samvitska, tá tað ræður um mannarættindi, javnstøðu og fólkaræði. Tað er oftast ES, sum tekur stig til altjóða tiltøk, har neyð og harðskapur valda. Men samveldið hevur eisini sínar eyðsýniligu veikleikar. Skipanin er ikki fólkslig, skrivstovuveldið er stórt og trongdin at gera nágreinligar reglur um snøgt sagt alt frá $CO_2$ útlati til bogan á agurkum og støddina á tomatum ger, at samveldi fyri vanliga fólk virkar fremmant og óviðkomandi. Her liggur eitt stórt arbeiði fyri framman, um ES skal verða breitt góðtikið av vanligum fólki í limalondunum. Hinvegin er hendan góðtøkan ein neyðug fortreyt fyri tí menningini av samveldinum, sum skal til, um ES skal verða lív lagað.

**Sosialurin**

## Fólkapensiónin má eisini verða regulerað

FINNUR JOHANSEN



Tíðindi í bløðunum vildu í seinastu viku vera við, at fleiri túsund alment sett starvsfólk fara at krevja meiri í løn fyri, sum tey siga, at vinna inn aftur ógvusligu príshækkingarnar hesa seinastu tíðina. Hetta váttar formaðurin í Starvsmannafelsgnum, verður sagt.

Fyri tveimum árum síðani varð gjørdur nýggjur sáttmáli, og í honum varð sagt, at um príshækkingarnar ávirka lønarlagið munandi, ber til at samráðast um lønina av nýggjum nú tvey ár seinni. Víst verður á, at livikostnaðurin er munandi hækkaður hesi tvey seinastu árini. Tí fara fakfeløgini at krevja meira í løn, og vilja hava samráðingar við fíggjarmálaráðið.

Men tað eru aðrir samfelagsbólkar, ið ikki av sær sjálvum fáa regulerað sínar inntøkur, sum vanligu fakfeløgini fáa tað. Fíggjarmálaráðið og aðrir mótpartar hjá fakfeløgunum mugu hava í huga at lata teir feløgini fáa ein inntøkuvøkstur, eigur inntøkan hjá pensionistunum eisini at verða økt, tí livikostnaðurin hjá teimum veksur eisini.

Tá lønmóttakararnir halda seg hava rætt til eina lønarhækkan eftir tveimum árum, má vera greitt, at pensionistarnir halda seg hava líka góðan rætt til hækkan av vanligu fólkapensiónini, ið ikki er regulerað í umleið eitt hálvt mannaminni.

Fáa lønmóttakararnir meira í løn, uttan at reguliga fólkapensiónin hækkar, verður pensiónin holað innan. Tað er tí ikki vist at pensionistarnir og álitsfólk teirra fara at lata sum einki, um aðrir samfelagsbólkar fáa meira í løn, uttan at pensionistarnir fáa nakað. Heldur ikki er vist, at pensionistarnir ikki í minsta lagi fara at gera vart við seg, og at vísa á skeivleikarnar í skipanini og tað órættvísa í henni.

## Sjálvcensurur - ella politisk hetz móti Sosialinum?

ROLF GUTTESEN



Í Sosialinum tann 11. juni kunna vit lesa eina umbering. Blaðstjórnin gevur Norðuratlantsbólkinum í Fólkatinginum eina umbering, tí ein persónur í eini samrøðu við meg hevur brúkt nøkur orð, sum vóru kritisk móti einari kanning, sum hesin bólkur hevur gjørt. Legg merki til, at hetta er ein "umbering" - ikki ein rætting.

Eg má siga, at eg undrist.

Og tað stórliga.

Hvat gongur fyri seg? Samrøðan var í blaðnum tann 23. mai. Men longu dagin fyri, tann 22. mai á síðu 19, var ein notits, sum segði frá hvat næsta samrøða fór at innihalda. Umleið 3 vikur eru nú gingnar, síðan orðini komu uppá prent. Hví kemur ein umbering nú?

Eg síggi bert tveir møguleikar, og báðir eru ótespiligir.

Antin hevur blaðstjórnin á Sosialinum sovið hesa tíð, og ikki vita hvat ið blaðið prentaði. So eru teir kanska farnir at blaða aftur í gomul bløð, har teir hava funnið nøkur "óhóskandi" orð. Hesin møguleiki er lítið trúligur.

Ella eru teir pressaðir og hóttir av onkrum, sum følir seg raktan. Og tað kann bara vera hesin lítli bólkurin við tí uppblásta navninum, Norðuratlantsbólkurin, sum hevur lagt eftir Sosialinum.

Eg síggi tveir álvarsligar vandar í hesi løgnu umbering.

Eitt er, at Sosialurin nú praktiserar eitt slag av sjálvcensuri. Teir lata seg pressa. Teir vilja ikki lata fólk, sum úttala seg í samrøðum, brúka ávís orð og søguligar samanberingar.

Annað er, at ein politiskur bólkur leggur trýst og press á miðlar, so teir ikki tora at skriva ávís orð og meiningar. Eg skal ikki royna at seta navn á hendan tendens. Teir vilja skerja tað talu- og skrivifrælsi, sum er staðfest í okkara grundlóg § 77.

Haraftrat vil eg siga, at hesin lítli bólkur á Fólkatingi spælir eitt ódámligt og ómansligt hulduspæl.

Um teir meina, at nakað er í samrøðuni, sum er átaluvert, so kundu teir lagt navn til eina viðmerking ella rætting.

Um teir meina, at nakað straffbart er sagt, so eru teir vælkomnir at saksøkja. Men hundarnir tora ikki.

Eg fari undir øllum umstøðum at lata fólk siga sína erligu meining, og at brúka síni egnu orð, um líknandi arbeiði skal gerast aftur. Eisini sjálvt um tað nationalistiska etablissementið kanska følir seg rakt.

## Viðmerking til Rolf Guttesen

Sjálvsagt virða vit á Sosialinum skrivi- og talufrælsið. Men tað skal gerast undir ábyrgd. Í redaktiónellum greinum í Sosialinum verða ikki nýttar slíkar tilsipingar til nazismuna og Hitler, sum Rolf nýtti í áðurnevndu grein. Hesum tekur Sosialurin frástøðu frá. Slíkt er lítið gagnligt fyri orðaskiftið. Rolf Guttesen dregur orðaskiftið niður á eitt sera lágt støði við slíkum málburði, eitt nú tá hann kallar ávís fólk fyri hundar. Spell um annars skilagott íkast til demokratiska orðaskiftið skal drukna í illgitingum og illsinnisglepsum.

**Blaðstjórnin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.